## Byrial nýggjan liðfelaga

AC Horsens, har Johan Byrial Hansen er ein av spælarunum, hevur gjørt sáttmála við ein 18 ára gamlan ghanesiskan álopsspælara. Tawfik Alolo hevur roynt seg í bestu deildini í Ghana, og nú skal hann spæla í AC Horsens næsta hálva árið. Gongur tað væl, kann sáttmálin leingjast við einum ári.

**ek**

## Keflavík fær australiara

Í vikuni seldi íslendska felagið Keflavík ein av sínum álopsspælarum til danska felagið Silkeborg. Nú hevur Keflavík funnið avloysaran fyri hendan spælaran, tí australski Buddy Farah gjørdi mánadagin sáttmála við Keflavík. Buddy Farah hevur spælt á øllum ungdómslandsliðunum hjá Australia, og næstu tvey árini skal hann royna seg sum liðfelagi hjá Símuni Samuelsen í Keflavík.

**ek**

## Væntar nógv av AaB

Nýggi spælarin í hópinum hjá AaB, Fredrik Wisnes, væntar sær nógv av liðunum, har eisini tveir føroyskir landsliðsspælarar spæla við.

– Vit hava fingið eina góða byrjan, har vit leggja eitt gott grundarlag áðrenn kappingin byrjar. Harafturat tykist tað verða ein greið strategi við tí, sum vit gera, og tað er minst líka týdningarmikið, sigur Wisnes við Forza.

– Vit spæla tekniskan fótbólt, sum passar mær væl. Vit hava nakrar sera góðar ungar spælarar á liðnum, so tað lovar gott, sigur hann.

**ek**

## UEFA heiðrar Schmeichel

Danski málmaðurin Peter Schmeichel fekk nú um dagarnar ein heiður frá europeiska fótbólssamandinum UEFA. Í sambandi við at europeiska kappingin fyri meistaralið fylti 50 ár, valdi UEFA at heiðra nøkrum av spælarunum, sum hava spælt í finaluni. Teirra millum vóru Franz Beckenbauer, Johan Curyff og Peter Schmeichel.

– Tú ert einasti dani, sum hevur vunnið Champions League sum liðformur, segði Frits Ahlstrøm, tá ið hann vegna UEFA handaði Schmeichel heiðurin.

# Fólkaræðið loyvir fleiri valevnum

**Hóast Óli Holm ásannar, at tað hevði havt verið hugaligari við arbeiðsfriði, so ynskir hann ikki at forða nøkrum at bjóða seg fram sum mótvalevni til formanssessin í FSF**

FSF FORMANSVAL

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá vit hóskvøldið høvdu orðið á Óla Holm, formann í FSF, hevði hann ikki hoyrt meira enn nakað av gramli um, at okkurt mótvalevni kanska fór at koma undan kavi komandi vikuna. Óli hevur verið formaður í FSF í tvey ár, og hann hevur boðað frá, at hann er sinnaður at taka við afturvali.

Spurdur um viðmerking til støðuna, har formenn eru uppringdir við áheitan um stuðul til annað valevni, sigur Óli, at tað hvørki fær hann gjørt nakað við ella vil hann gera nakað við.

– FSF er jú ein demokratiskur felagsskapur. Tí stendur tað feløgunum frítt at skjóta upp tey formansvalevni, sum tey vilja hava at velja ímillum. Og tað stendur teimum sjálvandi eisini frítt at velja millum valevnini á aðalfundinum.



*– FSF er jú ein demokratiskur felagsskapur. Tí stendur tað feløgunum frítt at skjóta upp tey formansvalevni, sum tey vilja hava at velja ímillum. Og tað stendur teimum sjálvandi eisini frítt at velja millum valevnini á aðalfundinum, sigur Óli Holm, formaður í FSF*

Men hevði tað sum hjá tær sum formanni ikki verið hugaligari, um einki mótvalevni var á aðalfundinum.

– Fyri ein felagsskap er tað sjálvandi altíð best við arbeiðsfriði og støðugum viðurskiftum sum heild. Men eitt demokrati er nú soleiðis samansett, at fleiri evni kunnu skjótast upp. Tað er jú millum annað júst hetta, sum er ein partur av grundarlagnum undir FSF, sigur Óli Holm at enda.

# Gunnar og Jónas sleppa at royna seg

**Teir báðir føroysku spælararnir í Frem venja dúgliga í hesum døgum. Frem hevur mist fleiri stuðulsspælarar, men teir ætla sær at verða verandi í næstbestu donsku deildini, og líkt er til, at føroysku spælararnir sleppa at royna seg**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Málið hjá mær er at sleppa at spæla nakrar dystir í vár. Nú havi eg roynt at spæla á besta liðnum, og tað smakkar av meira, sigur Gunnar Nielsen, málmaður í Frem*

Gunnar Nielsen og Jónas Tór Næs eru tveir ungir føroyskir fótbóltsspælarar í donskum fótbólti. Teir hava seinnu árini spælt fyri felagið Frem, meðan teir hava gingið á handilsskúla í Ishøj.

Framgongdin hjá teimum hevur verið eyðsýnd, og teir verða í vár partur av besta liðnum hjá Frem, sum spælir í næstbestu donsku deildini.

Gunnar er málmaður, og Jónas spælir serliga sum høgri bakkur.

– Vit hava vant tríggjar ferðir um vikuna, men nú eru vit farnir upp at venja fimm ferðir um vikuna, so vit royna at fyrireika okkum væl til kappingina, sigur Gunnar Nielsen.

### Munurin minkar

Frem hevur spælt tveir venjingardystir, og føroysku spælararnir vóru við í tí fyrra dystinum. Tá stóð Gunnar í málinum, meðan Jónas slapp at royna seg sum miðverji. Tá Frem spældi seinna dystin, vóru teir báðir í Føroyum til landsliðsvenjing.

Jónas Tór Næs kann rokna við at sleppa at royna seg sum høgri bakkur á liðnum hjá Frem. Gunnar Nielsen stríðist við at sleppa fram at málinum, men har skal hann kappast við ein sterkan málmann, Jørgen Nielsen, sum áður hevur spælt í Liverpool.

– Málið hjá mær er at sleppa at spæla nakrar dystir í vár. Nú havi eg roynt at spæla á besta liðnum, og tað smakkar av meira, sigur tann 195 sentimetrar høgi málmaðurin.

– Jørgen er ein sera góður málmaður, men eg haldi, at munurin millum okkum minkar, heldur Gunnar.

### Yvirliva í 1. deild

Frem hevur seinastu mánaðirnar mist fleiri stuðulsspælarar – teirra millum Jón Róa Jacobsen – og venjarin Ebbe Skovdahl er eisini farin. Hetta komst av fíggjarligu støðuni hjá felagnum. Frem hevur fingið onkrar nýggjar spælarar afturat, men liðið er neyvan so sterkt, sum tað onkuntíð hevur verið.

– Málið hjá okkum verður at yvirliva í 1. deild. Hóast vit stíla eftir at liggja í miðjuni í deildini, so er vegurin niður í botnin ikki so langur, og tí skulu vit allatíðina ansa okkum, sigur Gunnar Nielsen.

Hetta vikuskiftið kunnu hann og Jónas halda frí, tí eftir ein harða viku, hava spælararnir fingið frí um vikuskiftið.

Hondbóltsstøður

**Sunset-kappingin FM-bólkurin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 77 | 61 | 16 | 4 |
| 2 Stjørnan | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 78 | 66 | 12 | 4 |
| 3 VB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 65 | 75 | -10 | 4 |
| 4 Kyndil | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 55 | 73 | -18 | 0 |

**Sunset-kappingin Niðari bólkurin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 76 | 57 | 19 | 6 |
| 2 Søljan | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 61 | 60 | 1 | 4 |
| 3 VÍF | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 65 | 72 | -7 | 2 |
| 4 Tjaldur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 62 | 75 | -13 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 H71 | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 376 | 318 | 58 | 14 |
| 2 VÍF | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 382 | 367 | 15 | 13 |
| 3 Kyndil | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 367 | 333 | 34 | 11 |
| 4 StÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 345 | 345 | 0 | 10 |
| 5 KÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 353 | 374 | -21 | 6 |
| 6 Neistin | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 360 | 446 | -86 | 1 |

Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 14 | 14 | - | 0 | 42 | 14 | 28 | 18 |
| 2 SÍ | 15 | 9 | - | 6 | 34 | 28 | 6 | 11 |
| 3 TB | 14 | 7 | - | 7 | 28 | 23 | 5 | 10 |
| 4 ÍF | 14 | 7 | - | 7 | 30 | 26 | 4 | 8 |
| 5 Mjølnir | 14 | 3 | - | 11 | 16 | 36 | -20 | 4 |
| 6 KÍF | 13 | 2 | - | 11 | 12 | 35 | -23 | 3 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 11 | 10 | - | 1 | 31 | 11 | 20 | 13 |
| 2 SÍ | 10 | 7 | - | 3 | 24 | 13 | 11 | 8 |
| 3 Mjølnir | 10 | 5 | - | 5 | 21 | 16 | 5 | 6 |
| 4 ÍF | 9 | 3 | - | 6 | 14 | 20 | -6 | 3 |
| 5 Nøvan | 10 | 0 | - | 10 | 0 | 30 | -30 | 0 |

# Nordlie situr væl

**Sambært veddingarfyritøkuni, Nordicbet, er lítil vandi fyri, at Todi Jónsson og teir í Start skulu leita sær eftir nýggjum venjara fyribils.**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú fyrireikingarnar til norsku kappingina av álvara eru farnar ígongd, ber til at vedda um mangt og hvat. Millum annað, hvør verður fyrsti venjarin at fáa sekkin.

Og her bendir lítið á, at Tom Nordlie verður tann fyrstu, sum rýkur. Verður Start-venjarin tann fyrsti venjarin í Tippeliguni, sum fær sekkin í ár, so gevur hetta pengarnar 30 ferðir aftur. Og tað er meira, enn nakar annar venjari gevur. Ovast á listanum stendur Frode Grodås hjá Ham-Kam. Hann gevur bara pengarnar fimm ferðir aftur.

Roknað verður annars við, at Start aftur í ár skal standa seg væl. Tá spælast skal um, hvør verður norskur meistari, er Start fjórð-ovasta navnið á listanum. Ovast er Rosenborg, sum bert gevur pengarnar 2,25 ferðir aftur. Spæl upp á Start gevur odds 8,20.